## Skála áhuga í styrki

Venjarin hjá Skála, John Petersen, sigur við heimasíðuna hjá felagnum, at felagið hevur roynt at styrkja seg við nýggjum spælarum, men hetta hevur ikki eydnast enn. - Flytingarvindeygað er tó opið í ein góðan mánaða afturat, so enn er møguleiki fyri at vit fáa tilgongd, sigur John Petersen. Hann fegnast um, at flestu av spælarunum, sum vóru við í fjør, halda fram í felagnum, og at ungir spælarar eisini bjóða seg fram til liðið.



## Maldini ikki áhugaðurí útlandinum

Italski verjuspælarin Paolo Maldini hevur alla sína tíð sum fótbóltsspælari spælt fyri AC Milan, og hann sigur seg ongantíð hava umhugsað at skift felag. - Eg havi verið heppin at sleppa at spæla í mínum heimbýi, her pápi mín eisini varð heiðraður sum europameistari. Eg havi ongantíð kent trongd til at skifta felag, men skuldi eg spælt í einum øðrum landi, so hevði tað verið í Spania, sigur Maldini, sum gevst sum fótbóltsspælari í summar.

Neistin-H71 25-23 (15-13):

# Finn bjargaði Neistanum

**Hoyvíkingar megnaðu ikki at basa stórspælinum frá málmansveteraninum, og so kundi Neistin taka eitt stórt fet móti FM-finaluni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við fimm stigum niður til H71 á triðja plássinum er lítil ivi um, at Neistin nú er væl ávegis móti FM-finaluni.

Tað var niðurstøðan eftir dystin á Hálsi sunnudagin, tá Neistin og H71 spældu eina grannauppgerð, ið kann flokkast millum tær heilt undirhaldandi.

Undirhaldið var nú ikki so heilt nógv takkað verið góðum spæli. Ferðin varð frá byrjan sett langt upp, og tí var talið av mistøkum eisini hareftir. Tað eydnaðist tó fyri tað mest hjá Neistanum at halda sær frammanfyri, tó at H71 eisini hevði sínar løtur, har teir vóru á odda.

Eftir steðgin hevði dysturin tó hug til at venda. Jens Skipagøta í H71 hevði einar tvær tríggjar framúr bjargingar, og so tóktist tað, sum



*Hoyvíkingar kunnu eina mest takka sær sjálvum, at teir ikki øktu um spenningin í kapprenningini um finaluplássini*
*savnsmynd*

skuldu hoyvíkingarnir veruliga gera um seg. Í hinum endanum hevði Nemanja Racic trupult við at lyfta sítt málmansspæl, og í eini seinastu roynd at venda dystinum, skiftu teir bláu ístaðin Finn á Svøð inn.

Málmansveteranurin hevur kanska ikki havt heilt so nógva spælitíð í ár, men teir 20 minuttirnar, sum hann hesa ferð var á vøllinum, prógvaði hann so dyggiliga sítt virði. Alt fyri eitt hevði hann nakrar frálíkar bjarginar móti leysum hoyvíkingum, og tað gav Neistanum møguleikan at vinna seg aftur.

Og so ber illa til at siga annað, enn at hoyvíkingarnir eisini hjálptu væl til í so máta. Ikki bara hildu teir á fram at misnýta góðar møguleikar. Tríggjar ferðir áttu teir eisini brotskast, men til hvørt av hesum kom Racic aftur í málið at bjarga skotinum, fyri síðani at lata sessin frá sær aftur til Finn.

Frustratiónirnar hjá H71 bara øktust, men veruliga møguleikan mistu teir ikki, fyrr enn Esbern Patursson fekk sær eina púrasat óneyðuga útvísing til seinasta minuttin. Og so kundi Neistin punktera dystin heilt við tveimum teimum seinastu málunum.

Hóast spælið væl kundi verið betur, so var fagnaðurin hjá teimum bláu stórur. Gaman í eru enn seks dystir eftir at spæla, áðrenn finaluliðini verða kosin, men við fimm stigum niður til næstu kappingarneytarnar er lítil ivi um, at Neistin er annað liðið í finaluni. Og við tilgongd av Jacob Larsen og Jakob Jónsson til komandi dystirnar verður talan eisini um styrkt lið, sum skal taka seinasta takið.

Hoyvíkingar kunnu hinvegin í stóran mun takka sær sjálvum, at úrtøkan ikki gjørdist størri hesaferð. Og so er spurningurin, um teir hóast hetta megna at halda dampinum uppi seinasta partin av kappingini.

### FAKTA

**Neistin-H71 26-23 (15-13)**
10 min: 3-3
20 min: 10-9
40 min: 17-17
50 min: 21-19
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Jugoslav Djumic 7, Karl Herup Olsen 6, Ingi Olsen 4(1), Blagoje Buha 3(1), Roar Dalsgarð 2, Tróndur Kragesteen 2, Dann Thorleifsson 1, Jón Ludvík 1
**H71:** Dánjal Tórgarð 6(4), Bárður Brimvík 5, Gunnar Bláberg 4, Niels Viggo Niclasen 3, Eyðun Højgaard 2, Janus Sørensen 2, Halgir Dahl Olesen 1
**Brotskøst:** Neistin 2, H71 6
**Útvísingar:** Neistin 5, H71 3
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (3X2 minuttir)

KÍF-StÍF 22-34 (10-12):

# KÍF er punkterað

**Tá StÍF fekk ferð á, høvdu teir als ongar trupulleikar av KÍF, sum tykist púrasta steðgað upp**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍF hevur als ikki livað upp til stóru vónirnar, sum nógv høvdu til liðið undan kappingarbyrjan.

Skaðar hava gjørt sítt til at arga KÍF, sum frá kappingarbyrjan hevur verið botnproppur í Atlantic Airways-deildini.

Sunnudagin megnaðu kollfirðingar tó at fylgja so hampuliga væl við StÍF helmingin av dystinum, men tá oddaliðið setti ferðina upp eftir steðgin, gjørdist munurin heilt stórur. Strandingar sópaðu allan iva til viks fyrsta korterið av seinna hálvleiki, og longu nú kunnu viðhaldsfólkini hjá StÍF so smátt fara undir fyrireikingarnar til, hvussu liðið skal stuðlast í FM-finaluni.

Hjá KÍF stendur hinvegin einki til. Lítið er, sum bendir á, at liðið skal vinna seg av aftasta plássinum í kappingini, har teir framvegis bert hava trý stig.

**Fakta um dystin**
KÍF-StÍF 22-34
(10-12)
10 min: 3-3
20 min: 7-8
40 min: 13-20
50 min: 15-27
Málskjúttar
**KÍF:** Dean Jankovic 7, Damir Oros 6(1), Niklas Reginsson 4, Jákup Trúgvason 3, Tony Weihe 2
**StÍF:** Davic Edvardsen 8, Sveinur Justinussen 7, Danni Syhler 6, Leivur Justinussen 3, Borgar Danielsen 3, Bárður Danielsen 3, Bent Djurhuus 2, Rúni Niclasen 1, Jón Rasmussen 1
**Brotskøst:** KÍF 1, StÍF 2
**Útvísingar:** KÍF 7, StÍF 1
**Diskvalifikatión:** KÍF 1 (3X2 minuttir)
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen

# Kastarar á venjingarlegu í Vaxjø

**Bestu føroysku kastararnir eru nú á venjingarlegu í Svøríki, har tey fáa frálæru frá svenska landsliðsvenjaranum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Ein málrætta menning av bestu íðkarum innan frælsu ítróttirnar ferð fram í løtuni, men ein tann størsti trupulleikin fyri at kunna optimera hetta er, at ymsu greinarnar innan frælsur ítróttirnar eru so ymiskar, at tað ikki er gjørligt hjá nøkrum venjara at dekka meir enn nakrar heilt fáar greinar.Og um tosað verður um teknisku greinarnar, so er tað sjáldan at ein venjari klárar at spenna yvir meri enn tvær greinar. Tí roynur Frælsur Ítróttur Føroya áhaldandi at fáa samstarv í lag við útlendskar venjara í hvør í sínum lag eru kapasitetir á sínum øki.

Eitt av ítøkiligu úrslitunum av átakinum hjá FÍF er at bestu føroysku kastararnir nú eru á venjingarlegu í Svøríki fyri at fáa íblástur til sína venjing fram móti oyggjaleikunum í 2009 á Álandi. Farið verður til Vaxjø, har møguligt er at venja kast innandura. Tað sum ger at Vaxjø er valt er at landsliðsvenjarin í spjótkast (Jonas Mellblom) er venjari har. Hann venur m.a. Magnus Arvidssen sum í 2007 etableraði seg sum ein av heimsins allar bestu spjótkastarum. Á myndini sæðst Magnus leggja lag á hjá Rógva seinast kastarnir vóru á venjingarlegu í Vaxjø.

Við í føroyska feralagnum eru Rógvi Højgaard (spjótkast), Randi Kúrberg (hamarkast) og Heri Ziska (diskuskast og hamarkast). Føroysku kastarnir fóru til Vaxjø sunnudagin 20. januar og koma tvey heimaftur sunnudagin 27. januar.



*Fremstu føroysku kastararnir eru komandi vikuna á spennandi venjingarlegu í Svøríki*